Limaskapur í ES hevði skjótt máað støðið undan føroyska búskapinum

– Tá ið tosað verður um føroyskan ES limaskap, er fyrsta treytin, at ræðið á fiskatilfeingi Føroya er føroyskt. Men hetta sær ikki út til at latra seg gera eftir galdandi ES-reglum, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað verður ikki undir hesum landsstýrinum at Førooyar fara at søkja um limaskap í ES. Landsstýrið heldur, at besta loysnin fyri Føroyar er at víðka handilsavtaluna, sum vit longu hava við ES, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður

–Verða Føroyar limur í ES, hevði ræðið á fiskatilfeingi Føroya ligið í hondunum á ES myndugleikum.

– Og tá kundi vandi verið fyri, at Føroyar í longdini høvdu mist sítt fiskatilfeingi.

Anfinn Kallsberg, Løgmaður, heldur ikki, at Føroyar skulu blíva limur í Evropasamveldinum, ES.

Og tað verður ikki undir hesum landsstýrinum, at Føroyar fara at søkja um limaskap ES

Tá ið løgmaður mikudagin legði fram frágreiðing sína um uttanlandsmál, gjørdi hann nokk so fitt burturúr framtíðar støðu Føroya í Evropa, ikki minst, hvat tilkýti Føroyar skulu hava við ES-londini

Men Landsstýrið heldur ikki, at tað er ráðiligt at søkja um ES limaskap.

Landsstýrið ætlar heldur ikki at arbeiða fyri at fáa Føroyar uppí EBS samstarvið

Hinvegin heldur landsstýrið at besta loysnin fyri okkum er at taka upp samráðingar við ES um at rúmka ta handilsavtalu, sum vit longu hava við Evropa samveldið.

Løgmaður sigur, at hann hevur kannað eftir, hvør ið best gongda leiðin í einum tættari samstarvi við ES er.

– Í fyrstu atløgu eru trýggir møguleikar. Føroyar kunnu antin gerast partur í EFTA og EBS, ella Føroyar kunnu gerast limur í ES.

Og triði møguleikin er, at Føroyar gera eina betri handilsavtalu við ES.

Hevur onga framtíð

Løgmaður heldur, at teir báðir fyrstu møguleikarnar eru ikki tann gongda leiðin fyri Føroyar.

Fríhandilsfelagsskapurin EFTA (European Free Trade Association) varð settur á stovn í 1960. Hetta er ein fríhandilsskipan, sum í høvuðsheitum hevur arbeitt fyri fríhandli fyri vørur.

– Tá ið sáttmálin um EFTA varð undirskrivaður, vóru 7 limalond: Danmark, Eysturríki, Noreg, Portugal, Svøríki, Sveis og Stórabretland.

Í 1967 kom danski limaskapurin at fevna um Føroyar. Finnland gjørdist limur við avmarkaðum rættindum í 1961, Ísland gjørdist fullur limur í 1970 og Liktinstein fullur limur í 1991.

Flestu limalondini í EFTA eru síðani vorðin limir í ES. Føroyar fóru burturúr EFTA í 1973 saman við Danmark. Og Eftir í felagsskapinum eru nú bara Ísland, Noreg, Liktinstein og Sveis. Bara sjálvstøðug lond kunnu vera í EFTA.

Av tí at EFTA ikki er ein tollsamgonga, kunnu limalondini føra egnan handilspolitikk mótvegis londum, ið ikki eru limir. ES er týdningarmesti samstarvsfelagi hjá EFTA.

Í 1990 var farið at samráðast um ein nýggjan leist í samstarvinum millum ES og EFTA.

Hesin leistur er róptur EBS (Evropiska Búskaparliga Samstarvið). EBS sáttmálin knýtir EFTA londini tættari at innmarknaðinum í ES. Átjan lond eru við í EBS samstarvinum, umframt tey fimtan ES londini eru Ísland, Noreg og Liktinstein við.

Løgmaður sigur, at grundsjónarmiðið við EBS sáttmálanum er at skipa eitt virkið og einsháttað búskaparligt samstarv, ið skal fremja eins reglur og kappingartreytir millum londini.

EBS londini í EFTA , sum eru Ísland, Noreg og Liktinstein, hava felags löggávu við ES fyri innmarknaðin, men hava sínar egnu stovnar á politiskum og fyrisitingarligum stigi. ES og EFTA londini hava hvør sína eftirlits og dómstólsskipan.

Samstarvið fevnir ikki um fiskivinnu- og landbúnaðarpolitikk, hóast sáttmálin fevnir um handil við fiskavørum.

Sigast kann, at EBS skipanin í grundinni var ætlað sum ein fyribilsskipan, ið fleiri av EFTA londunum tóku sum eitt stig á leiðini fram ímóti fullum ES limaskapi og tað er sumt, sum bendir á, at EBS samstarvinum verður neyvan lív lagað.

Ein av stóru trupulleikunum er at EFTA londini í EBS hava ikki beinleiðis atgongd til avgerðirnar.

Serliga er hetta ein trupulleiki fyri eitt land sum Noreg. Lítið rúm er fyri politikki í skipanini, tó hittast ráðharrar í EBS ráðnum árliga. Sostatt gongur so at siga alt fyri seg á embætismannastigi.

– Tað er ongin dynamikkur í EBS skipanini aftur ímóti sáttmálunum, sum ES hevur við mið- og eysturevropisku londini, men hon verður verandi, sum hon er, til hon fellur burtur.

Áhugin fyri EBS skipanini og áhugin fyri at gera broytingar fyri at ganga EFTA londunum á møti, minkar so hvørt sum áhugin fyri mið- og eysturevropisku londunum veksur.

Sum nevnt kunnu bara sjálvstøðug lond verða limur í EFTA og EBS. Hinvegin skuldi einki verið í vegin fyri føroyskum limaskapi, um Føroyar fáa fullveldi. Men EBS skipanin er dýr og krevur stóra almenna umsiting.

Anfinn Kallsberg sigur, at velur Noreg at gerast limur í ES, er stórur vandi fyri, at møguleikin eftir, og tað er at gera handilsavtaluna við ES betur, og tað er hendan loysnin, sum Landsstýrið fer at virka fyri.

– Eftir kanningum um tættari samstarv við ES, bendir alt á, at okkara áhugamál kunnu verða gingin á møti í eini betri avtalu.

– Tí hetta vil í fyrstu atløgu siga, at vit sleppa bæði undan tí felags fiskivinnupolitikkinum, sum ES limaskapur ber í sær og tí kostnaðarmiklu fyrisiting, ið EBS skipanin ber í sær.

Anfinn Kallsberg sigur, at nýggja hetta verður sett í verk við samráðingum um at gera nýggjar ískoytissáttmálar til handilssáttmálan, sum er ímillum partarnar.

Hann sigur, at líkt er til, at tað ber til at fáa fyrimunirnar í EBS samstarvinum við, um handilssáttmálin, sum longu er, verður víðkaður við ískoytissáttmálum.

– Við øðrum orðum forðar einki í grundini fyri, at tey fýra frælsini í EBS leistinum, og onnur viðkomandi øki, fara at ganga inn í eina nýggja samstarvsskipan.

Hann sigur, at ískoytissáttmálar kunnu gerast fyri hvørt øki.

Tey fýra frælsini fevna um: Vørur, tænastur, kapital og fólk. Harumframt eru hesi øki knýtt at teim fýra frælsunum: Kappingarreglur, reglur fyri almennum stuðuli til vinnulív og tað, sum verður nevnt vatnrætt samstarv, ið hevur týdning fyri tey fýra frælsini.

Vatnrætta samstarvið fevnir um: Almannapolitikk, tøkniliga menning, ferðavinnu, brúkaravernd, kunningartænastur, útvarps- og sjónvarpsmál, umhvørvi, útbúgvingar, íbúgvavernd, hagtøl, vinnuútbúgvingar, vinnulívsrætt, ungdómsviðurskifti, granskning og stuðulsskipanir fyri smáar og miðalstórar fyritøkur.

– Verða ískoytissáttmálar knýttir at handilssáttmálanum, áttu føroyingar stórt sæð at fingið við allar teir fyrimunir, EBS leisturin í dag fevnir um. Hetta gevur okkum somu sømdir sum EBS londini fáa, tá ið hugsað verður um tilknýtið til ES.

Hann legði afturat, at Sveis er í holt við at fáa sær eina líknandi samstarvsskipan við ES

– Verður hugsað um gongdina í Evropa í dag, tvs víðkanina av ES eystureftir, møguligum norskum limaskapi í ES, framtíðarútlitini og vansarnar við limaskapi ES og EFTA/EBS, er frægasta leiðin til tættari samstarv við ES at víðka sáttmálan við ískoytissáttmálum, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Missa ræðið á fiskiríkidøminum

Annfinn Kallsberg sigur, at skulu vit tosa um føroyskan limaskapi ES, førir tað tveir høvuðstrupulleikar við sær.

Annar er rættarstøða Føroya og hin er fiskivinnupolitikkur ES.

Men viðvíkjandi limaskapi eru harafturat tveir kostir í at velja:

Antin kunnu Føroyar gerast partur av danska limaskapinum í ES ella gerast limur í ES sum sjálvstøðugt land.

Við øðrum orðum skulu vit antin lata danir umboða okkum í ES, ella skulu vit hava okkara egnu, føroysku umboðan.

– Men um Føroyar gjørdust limir í ES, hevði felags fiskivinnupolitikkurin í ES verið settur í verk í Føroyum.

– Hetta hevði verið óheppið, tí tá hevði ræðið á fiskatilfeingi Føroya komið undir umsiting hjá ES myndugleikum.

Anfinn Kallsberg sigur, at Landsstýri heldur ikki, at áhugamál okkara verða tryggjað í fiskivinnupolitikkinum hjá ES, uttan mun til, um limaskapurin er beinleiðis ella umvegis Danmark.

– Vandi kundi verið fyri, at Føroyar í longdini høvdu mist sítt fiskatilfeingi, um Føroyar vórðu limur í ES.

Í hesum sambandi nevndi hann, at trupulleikarnir við fiskivinnupolitikkinum hjá ES eru væl kendir í Bretlandi.

– Har er støðan tann, at reiðarararir úr Spania ogna sær bretsk fiskiskip og kvotur teirra, skifta manningarnar út við spanskar og avreiða síðani fiskin í øðrum londum enn í Bretlandi.

– Í okkara føri høvdu avleiðingarnar av slíkum skjótt máað støðið undan føroyska búskapinum, segði løgmaður.

Hann legði dent á, at tá ið tosað verður um føroyskan ES limaskap, er fyrsta treytin, at ræðið á fiskatilfeingi Føroya er føroyskt.

– Men hetta sær ikki út til at vera gjørligt eftir galdandi ES-reglum, legði hann afturat.

Besta loysnin

Sostatt er bara tann triði

Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri Ferðslutrygd

Tekur ikki undir við linari revsing

Leiðarin á Ráðnum fyri ferðslutrygd, Jón Kragesteen, sigur at teir ikki taka undir við linari revsing tá talan er um rúsdrekkakoyring. Harumframt heldur hann, at arbeiðsháttin í samband við lógarsmíð á ferðsluøkinum ikki er hin rætti

JÁKUP MØRK

Fyri stuttum var ført fram í føroysku fjølmiðlunum, at millum tær broytingar, sum ætlandi skulu gjøgnumførast í ferðslulógini, eru broyttar revsireglur fyri promillukoyring og ferðmikla koyring.

Fyri mong ljóðar hetta kanska eitt sindur øvugt, nú vit í fleiri ár hava tosað um 0-hugsjónina. Er talan ikki um eina partvísa legalisering av hesum lógarbrotum, um revsireglurnar nú verða broyttar, soleiðis at talan ístaðin gerst um treytaðan dóm, ístaðin fyri at koyrikortið verður tikið beinan vegin.

Ikki linari revsing

Jón Kragesteen, leiðari á Ráðnum fyri ferðslutrygd (RFF), sigur við Sosialin, at nevndin í RFF, ikki tekur undir við, at revsingin á rúsdrekkaøkinum skal linkast. Fyrstu ferð málið var til viðgerðar, var annars beint undan ársskiftinum 1994/1995, og hevði nevndin tá sera stutta tíð at umráða seg í.

Gjørt varð tá av, at taka undir við fútanum í hesum máli, men eftir at RFF síðani hevur kannað málið gjøllari, er nevndin seinni komin til tað niðurstøðu, at revsingin fyri rúsdrekkakoyring ikki eigur linkast.

Støðan í løtuni er tó tann, at nevndin í RFF situr í minniluta hesum viðvíkjandi.

Hvat viðvíkur revsingini fyri ferðmikla koyring, sigur Jón, at hesin spurningur tíverri er gloppin ímillum hjá teimum. Vit hava í stóran mun roynt at leggja áherslu á, at ferðmarkið skal lækkast, í tískil hava vit kanska ikki gjørt nóg greitt, at vit ikki taka undir við linari revsireglum á hesum øki.

Sjálvur metir hann, at júst frádøming av koyrikortinum er ein revsing, sum ger, at bilførarar hugsa seg um meira enn tí einu ferðina, áðrenn ferð verður sett á bilin, og at tað tískil kann vera sera óheppið, um hesin revsimøguleiki dettur burtur. Jón leggur tó afturat, at Politistafelagið hevur peika á hesi viðurskifti, og mæla teir frá, at revsingin á økinum gerst linari.

Heldur smærri tillagingar

Annars sigur Jón Kragesteen, at eftir hansara tykki verður arbeiði viðvíkjandi ferðslulógini gjørt á fullkomuliga skeivan hátt.

Sum er, er eingin broyting farin fram á økinum síðani 1988, og er hetta alt ov long tíð.

Nú skulu so fleiri umfatandi broytingar gerast, og hóast semja er um stóran part av hesum, so er hetta ein alt ov stórur biti at svølgja í senn. Heldur átti arbeiði við ferðslulógini at verið gjørt soleiðis, at talan alla tíðina var um smærri broytingar og tillagingar. Eisini tí hetta hevði givið ein nógv betri møguleika at kannað eftir, hvørja ávirkan einstøku broytingar hava.

Í hesum førinum er talan um átta høvuðspunkt, sum skulu broytast, og viðførir hetta til samans at 45 lógarbroytingar skulu gerast.

Hetta økir vandan fyri, at lógarsmíðið ikki er nóg gott, og at tað tískil kunnu uppstanda hol í lógini, sum møguliga ikki vera avdúkað, fyrr enn einstøk mál eru endað í rættinum.

Talan er bert um umseting

Eisini heldur Jón, at tað er ein óheppin gongd, tá vit so at siga nýta somu lógir her á landið, sum verða nýttar í Danmark. Tær lógarbroytingar, sum nú koma fyri, eru í stóran mun ajourføringar av lógini, so hon samsvarar við lógina í Danmark, og er hetta sera óheppið.

Viðurskiftini her á landi eru jú als ikki tey somu sum í Danmark, við tað at bæði landafrøðiligu og mentunarligu umstøðurnar eru øðrvísi.

Harafturat heldur Jón tað vera løgið, at ein arbeiðsbólkur skal setast, sum bert hevur til endamáls at góðtaka donsku lógirnar. Er hetta endamálið, hevði frægasta loysnin verið at sett ein dugnaligan umsetara.

Tær flestu broytingarnar í málinum eru í lagi, men eftir mínari fatan, er arbeiðsháttin skeivur, sigur Jón Kragesteen at enda

Hjartamálini liggja á láni

Fólkaflokstingmenn eru misnøgdir við, at landsstýrismaður við fíggjarmálum einki ger við teirra hjartamál í samgonguskjalinum

EYÐUN KLAKSTEIN

Tingmenn hjá Fólkaflokkinum taka nú harðliga til orðanna um, at nøkur av teirra hjartamálum í samgonguskjalinum verða skúgvað til viks.

Teir halda, at landsstýrismaðurin einki ger fyri lætta um skatta- og avgjaldstrýstið, soleiðis sum avtalað annars er í samgonguskjalinum.

Formaður fyri Fólkaflokkin á tingi, Óli Breckmann, og formaðurin í fíggjarnevndini hjá løgtinginum, Bjarni Djurholm, komu við hørðum atfinningum móti Karsteni Hansen, landsstýrismanni, á tingfundinum týsdagin.

Teir hildu, at landsstýrismaðurin einki fær á skafti, og Óli Breckmann segði seg ikki áður hava upplivað eitt tvey ára skeið, har so lítið hendi á skattaøkinum.

Tað sum tingmenninir hjá Fólkaflokkinum eru so misnøgdir við er, at nøkur av teimum málunum, sum teir stríddust fyri at fáa í samgonguskjalið, als ikki verða førd út í lívið.

– Tað er einki hent fyri at lætta um skatta- og avgjaldstrýstið hjá húsarhaldum og framleiðsluvinnuni, soleiðis sum vit annars høvdu avtalað. Og allar royndir siga, at skal nakað gerast við slík mál, so skal farast undir tey beinanvegin. Men nú eru tvey ár gingin av hesum valskeiðnum, og tað er einki hent enn, sigur Bjarni Djurholm.

Stúrir fyri partafelagsskattinum

Í samgonguskjalinum hava Fólkaflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin avtalað, at avgjaldstrýstið á húsarhald og framleiðsluvinnuna skal lækkast.

Arbeiðast skal fram ímóti størri skattfríari grundupphæd, arbeiðið fram móti eini bruttoskattaskipan skal halda fram, og hjún, har annar hevur alla inntøkuna, skulu javnstillast við hjún, har bæði hava inntøku.

– Men vit kunnu staðfesta, at einki er hent í hesum málum, og tað eru vit sera misnøgdir við. Vit hava ferð eftir ferð framført hetta á samgongufundum, men tað hevur einki hjálpt, sigur Bjarni Djurholm, formaður í fíggjarnevndini.

Í november mánaði gjørdu samgonguflokkarnir eina pappírsleysa avtalu um at lækka partafelagsskattin, men nú stúrir Bjarni Djurholm fyri, at einki uppskot verður lagt fyri tingið um hetta, áðrenn freistin er úti í mars mánaði.

– Hetta er stórt spell. Vit vóru sera fegin um at fáa hesi mál við í samgonguskjalið, men tað er als ikki nøktandi, at einki landsstýrismaðurin einki ger við málini, sigur hann.

Bjarni Djurholm er misnøgdur við, at einki verður gjørt fyri at føra nøkur av hjartamálinum hjá Fólkaflokkinum út í lívið

Bjarni Djurholm heldur, at øll uppskotini, sum higartil eru komin frá landsstýrismanninum, hava verið lógartekniskar broytingar og tillagingar.

– Tað er einki gjørt fyri at gera álvara av teimum politisku málunum, sum vit hava sett okkum fyri, sigur hann.

Vit royndu í gjár at fáa eina viðmerking frá Karsteni Hansen, landsstýrismanni við fíggjarmálum, men tað eydnaðist okkum ikki at fáa fatur á honum.

Nýggja flogfarið hóskar illa til Føroyar

Nýggja Challenger-flogfarið hjá donsku verjuni er illa egnað til flúgving í Føroyum og Grønlandi

Nýggja vaktar- og flutningsflogfarið hjá danska flogvápnum fær harðar ábreiðslur í CS-Blaðnum, sum er blað hjá starvsfólkunum í donsku verjuni.

Fólk av flogstøðini í Værløse verða endurgivin fyri at siga, at Challenger-flogfarið, sum er avloysarin hjá Gulf Stream flogfarinum, sum datt niður í Vágum í 1996, er illa egnað til flúgving í Føroyum og Grønlandi.

Sagt verður, at Challenger-flogfarið er væl egnað til feðafólkaflutning, men tað stendur seg ikki væl í síðuvindi, og tað lastar nógv minni enn Gulf Stream flogfarið gjørdi. Tað var júst síðuvindur sum gjørdi, at Gulf Stream flogfarið datt niður í Vágum.

Ein flogskipari og eigarin av flogfelagnum Sun-Air taka undir við atfinningunum, og tað verður eisini ført fram, at um flogfarið skal á flog við fullari last krevst ein breyt, sum er í minsta lagi 1.780 metrar long. Bæði í Vágum og í Grønlandi eru flogbreytirnar styttri enn tað.

Flogvápnið væntar, at Challenger-flogfarið verður góðkent til at flúgva í sama veðri sum Gulf Stream flogfarið var. Challenger kostar 175 milliónir krónur, og tað eru 40 milliónir færri enn Gulf Stream.

ek